# Flaggdagsrøða í Runavík



**Kári P. Højgaard, løgtingsmaður**

**Hesa røðuna helt Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, til flaggdagshaldið í Runavíkar kommunu 25/04-01**

Góðu Støkkarar, skótar, ítróttarfólk og áhoyrarar, sum eru komnir saman, at heiðra flagg okkara Merkið. Tøkk at tit eru møtt so fjølment henda vakra dag, 82 ár eftir at tað sá dagsins ljós, og 61 ár eftir at Merkið fekk altjóða viðurkenning.

Vit vilja eina løtu lata hug okkara leita aftur í tíðina, tá flagg okkara á fyrsta sinni sá dagsins ljós.

Tá føroyingurin er burturstaddur hendir ofta, at heimlongsulin og kenslurnar stimbra fosturlandsalskin.

Niels Juel Arge skrivar í bókini »Merkið flaggsøga okkara«, at tá samráðingar um frið eftir fyrra heimsbardaga tóku seg upp, gjørdust føroyskir studentar í Keypmannahavn sera eldhugaðir fyri tonkunum hjá amerikanska forsetanum Woodrow Wilson, um at skipa eitt fólkasamband, har allar tjóðir skuldu eiga sess, og at allar tjóðir skuldu hava frælsi til at avgera síni egnu viðurskifti.

Janus Øssurson og Jens Oliver Lisberg komu nógv saman við íslendskum studentum og vóru sera hugtiknir av teirra fosturlandsalski og sjálvbjargnisanda. Íslendingar høvdu fingið sítt egna flagg í 1913, men fingu sjálvstýri í 1918. Í 1919 fekk Jens Olivur, Nordisk Fane- og Flagfabrik at gera sær eitt stórt flagg eftir fyrimyndini av einum borðflaggi, sum Ninna Jacobsen úr Havn hevði seymað.

Tað kann sigast at Jens Olivur Lisberg eigur høvuðsheiðurin fyri, at vit í dag eiga okkara føroyska flagg. Lívsskeið hansara bleiv stokkut, tí hann doyði longu árið eftir 23 ára gamal. Hesin dýrgripur, prototypan, fyrsta føroyska flaggið hongur, sum flestu føroyingar helst vita í kirkjuni í Fámjin, heimbygdini hjá Jens Olivur.

Seinni heimsbardagi gjørdi, at flagg okkara fekk altjóða viðurkenning. Danmark varð hersett av týskinum og vit av bretum. Spurningurin varð loystur av enska herskipayvirvaldinum, sum 25 apríl 1940 um BBC læt boða frá á øllum høvuðsmálum, at føroysk skip sigla undir føroyskum flaggi, sum sær so og so út.

Tað hoyrir við til flaggsøgu okkara, at Mia kona Niels í Heiðinum, seymaði eitt silkiflagg til skonnartina Sannu, sum Napoleon Jacobsen á Glyvrum átti. Hetta flagg var umborð, tá teir fóru yvir til Amerika, við og eftir farmi. Í oktober 1940 sigldi Sanna undir føroyskum flaggi inn í havnina í New York.

Flagg okkara ber reytt krossmerki við bláari rond á hvítum dúki. Flestu grannatjóðir okkara hava eisini krossmerkið avmyndað í sínum flaggi. Tann tómi krossurin boðar frá tí størstu hending, sum fram er farin her á fold og gevur okkum sum liva lívsmót, áræði og dirvi, at liva og virka í samfelagnum, meðan lívsdagur okkara er, samstundis, sum tað gevur trygd og vón fyri teimum, sum undan okkum eru farin.

Flaggið er blivin ein náttúrligur partur av gerandisdegi okkara. Uttan mun til, hvussu ymisk vit eru bæði í áskoðan og atferð, so er flagg okkara eyðkennis- og savningarmerkið. Vit síggja býin flaggskýddan, bæði í gleði og í sorg. Skálafjørðurin hevur hesi seinastu árini verið fyri stórum missi bæði á sjógvi og landi, og í morgun var søgan nær við at endurtaka seg á Vestmannavegnum. Fyri stuttum vóru øll fløgg á eystara armi á fjørðinum vundin á hálva stong, tá syndarliga vanlukkan hendi, har vit mistu tríggjar raskar unglingar, sum stóðu í lívsins fagrasta blóma. Hendan hending stendur enn livandi í minni okkara og hava vit øll djúpastu samkenslu við tykkum sum mist hava.

Tó, tíðin stendur ikki í stað og lívið skal framhaldandi livast.

Hyggja vit rundan um okkum, er náttúran við at vakna úr vetrardvala. Sólin er hækkað á luftini og tað grør um gangandi fót. Hetta er eisini galdandi fyri búskap og livikor okkara. Fiskiskapurin hevur verið góður og fiskaprísirnir høgir. Arbeiðið hevur verið til allar hendur og til tíðir hevur størsti trupulleikin verið, at fingið nóg mikið av fólki til arbeiðis. Stórur áhugi er fyri at ogna sær grundstykki. Nógv byggiloyvi eru givin og fleiri sethús verða bygd í summar. Stórur tørvur er á útstykking til sethúsaøki, smærri íbúðir til støk og eldri umframt bygging av nýggjum barnagarði, eldrasambýli, víðkan av Ellis og Røktarheiminum, skúlum v. m. Býarplanurin verður í hesum døgum endurskoðaður til tess at hava møguleikan fyri at nøkta tørvin sum er.

Ein stór avbjóðing liggur fyri framman, tá Atlantic Fish Fair á altjóða støði fyriskipar størstu fiskivinnuframsýning, sum nakrantíð er hildin á Føroya landi. Einar 200 fyritøkur harav umleið helmingurin eru útlendingar, koma í døgunum frá 15. til 17. maj í høllum, teltum, bátahylinum og á havnalagnum, at sýna fram alskyns ting og tól sum hoyra sjónum, fiski og alivinnuni til. Sjómansheimið, sum vegna fíggjarligar trupulleikar, varð stongt í fjør, er opnað aftur og flaggskip okkara Norrøna, kemur at liggja sum hotelskip, meðan stevnan er. Hetta verður ein »generalprøvi« fyri fyriskipararnar og ikki minst fyri Runavíkar Kommunu. Býurin verður ruddaður, umframt veiðslu og flaggskrýddur hesar dagar, og verða tiltøk av ymiskum slag. Hjartans ynski og bøn mín er, at vit verða vælsignaðir við góðveðrið og túsundtals vitjandi hesar dagarnar. Vónandi hepnast so væl, at hetta verður eitt afturvendandi tiltak í framtíðini. Latið okkum, hvønn einstakan borgara gera okkara til at so verður.

Sum øllum kunnugt vunnu Skipafelagið Føroyar og Atlantic Supply Base kappingina um veitingina til oljuvirksemi í leitingarskeiðinum fyrstu trý árini. Útgerðarhavnin liggur í Saltangará og er longu stórt virksemi á økinum, sum skal verða liðugt seinast í oktober, tá nýggja havnalagið verður tikið í nýtslu. Tað liggur ein stór, álvarsom ábyrgd á okkum kommunalpolitikkarum og vinnuni at skipa so fyri, at nýggja oljuútgerðarhavnin, verður til minst møguligan ampa fyri tað núverandi virksemi, sum er á staðnum og sum er grundarlag fyri vælferðini. Í hesum sambandi er ætlanin at umskipa virksemi á havnalagnum, í samráð við fyritøkurnar sum virka her, so frakt og fiskur verður meira atskilt.

Merkið er ímyndin av Føroyum. Litirnir avspeglað lívið sum flaggsangur okkara so greitt sigur frá. Tann hvíti liturin er ímyndin, sum á vetri sæst klæða landið í vetrarbúnan alt frá fjalls til fjørðu. Eisini fram við strondini liggur stóran part av árinum hvíta skúmfroðan av briminum, sum áhaldandi roynir at mága butur av hesum harbaldnu klettum mitt úti í Atlantshavinum. Hesar oyggjar, sum staðið hava her síðan tíðarinnar morgun, minkaðar í vavi, men hava hildið út til henda dag.

Tann reyði liturin ímyndar blóðið og harvið lívið. Kraftin sum likamið fær, tá blóðið verður pumpað út í hvønn lim við ilt og føðslu, sum vit tørva áhaldandi. Karmurin, ramman er tann blái liturin, sum ímyndar luftina og havið. Vit markn-aðarføra okkum við heimsins reinasta umhvørvi og harvið reinastu vøru. Gævi at tað eisini verður ein veruleiki, tá komandi ættarlið skulu taka við eftir okkum.

Ein landstýrismaður er settur, sum burturav hevur olju og umhvørvismál um hendi. Hesin hevur saman við umsitingini gjørt eitt dygdargott arbeiði, og er hetta málsøki í tryggum hondum. Men tað áliggur tí einstaka, at verja og varða um náttúruna og umhvørvi, skal úrslitið verða nøktandi.

Størsta umbroytingin í lívskorum hjá mannaættini nakrantíð, hendi í øldini sum farin er. Tørvurin og krøvini í dag kunnu ikki samanberast við tá eitt nú okkara foreldur vóru ung. Fríríkkur Petersen yrkti so vakurt í 4 versinum av Eg oyggjar veit.

Mítt føðiland tað fátækt er,  
eg veit tað væl-  
ei gullsand áin við sær ber  
um fjalladal;  
Men meðan líðin elur seyð,  
og havið fisk,  
so fæst við Guds hjálp dagligt breyð  
á føroyings disk.  
Gud signi mítt føðiland Føroyar.

Hóast vit ikki altíð geva okkum far um tað, so er Føroyar ein perla at búgva í. Jørðin gevur sína grøði umframt at føða seyð og neyt. Havið er framvegis fongríkt og gevur arbeiði bæði á sjógv og landi. Harumframt verða nýggir møguleikar skaptir við oljuni undir havbotninum, sum búskaparliga kemur at geva okkum eitt bein afturat, at standa á.

Vit hava eitt land við havi kring okkum og egnum sjómarki, egna mentan, flagg og mál. Hetta er alt eyðkennir fyri at vera ein serstøk tjóð og vit eiga so hvørt haldgott grundarlag er fyri hesum, at yvirtaka málsøki, so at tað tað ein dag um ikki alt ov langa tíð verða føroyingar, sum koma at valda í Føroyum.

Flaggið er komið fyri at verða og er vorðið fólkaogn. Allir føroyingar elska Merkið og vísa tað stoltir fram heima so væl sum uttanlands. Vit halda tað vera eina sjálvfylgju, at allur heimurin skal kenna Føroyar í hesi kunningartíð vit liva í. Vit eru hóast alt undir hálvthundrað túsund fólk, ið búleikast á smáum 1400 ferkilometrum og og er land okkara so lítið í vavi, at tað nærum ikki sæst á heimskortinum. »Er de små, så er de raske«, segði maðurin á sinni og hava vit luttikið í mongum altjóða kappingum. Týdningarmestu úrslitini, hevur fótbóltslandslið fingið, og hava teir við spæli og atburði sínum, vunnið virðing úti í heimi. Eingin skal taka úrslitið av einum dysti fyri givið, áðrenn hann er leiktur, tí hava menn okkara ein góðan dag kann alt henda. Møguliga verður tað við hesa HM-kapping at sensatiónin verður veruleiki.

Stórar avbjóðingar liggja fyri framman og eitt er greitt; tað verður neyvan altíð viðrák. Tað er tí sera týdningarmikið, at vit standa saman, tá týdningarmiklar avgerðir skulu takast, tí sum vit vita, so gevur samanhald styrki.

Vit hava fingið landið í arv frá fedrum okkara. Latið okkum halda fæst um trúgv, siðaarv, mál og mentan okkara. Samlingartekinið er flagg okkara Merkið. Við tí á odda, vilja vit við dirvi ganga fram vitandi, at tá vit falla frá taka yngri kreftir við, so leingi sum heimurin stendur.

Undir krossins merki stóðu gamlir menn.  
Undir krossins merkið standa hetjur enn.  
Skulu vit tá svíkja, nei vit standa stinn.  
Breiði krossins merki út.

Til seinast vil eg takka fyri tað álit fyrireikararnir av flaggdagshaldinum vístu mær, við at lata meg halda flaggrøðuna 2001

Tøkk fyri at tit lýddu á.






## Reyði Krossur Føroya

**Box 1015, FO-110 Tórshavn**
**Tlf. 319630, Fax:311217**
**Teldupostur: redcross@redcross.fo**

**Skeiðtilboð: 1. hjálpar skeið:**

Ynski at luttaka í (set x)

☐ Grundskeið í 1. hjálp: byrjar 07.05.01 kl. 19.00

Kostnaður fyri hvønn við øllum frálærutilfari: kr. 380,-

☐ Víðka skeið (30 t.) í 1. hjálp, byrjar 18.05.01 kl. 19.00

Kostnaður fyri hvønn við øllum frálærutilfari: kr. 915,-

☐ Endurútb. í 1. hjálp (3 t.), byrjar 08.05.01 kl. 19.00

Krav er, at grund/víðka skeið ikki er eldri enn 3 ár.

Kostnaður fyri hvønn, sum skal hava frálærutilfar frá grundútb. við: kr. 75,-

☐ Sálarlig 1. hjálp (8 t.): byrjar 28.04.01 kl. 09.00

Kostnaður fyri hvønn við øllum frálærutilfari: kr. 270,-

☐ Upplýsandi fund um SAMARITTARAR tann: 02.05.01 kl. 20.00

☐ Tilboð kann gevast til bólkar.

Navn:______________________________

Bústaður:___________________________

Tlf.:__________Fax:___________

Teldup. adressa:_______________

Aldurskrav: hava fylt 14 ár.

Bryggjubakki 10/Vágsbotnur,
Boks1015, FO-110 Tórshavn

Tlf. 31 96 30 • Fax 31 12 17
Teldupostur: redcross@redcross.fo

# Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Farmakonomnæmingur
### søkist til Gilleleje Apotek

Gilleleje apotek søkir eftir føroyskum farmakonomnæmingi at byrja 1. juli 2001.

Útbúgvingin tekur 3 ár, og fer lutvíst fram á apotekinum og á Farmakonomskúlanum í Hillerød. Krøv til umsøkjaran: Students/HF prógv, HH ella HT.

Apotekið hevur eina íbúð til tveir næmingar nærhendis apotekinum. Hin næmingurin, ið eisini er føroyingur, er settur og skal byrja 1. juni.

Áhugað kunnu venda sær til Tjaldurs Apotek, tlf. 341100.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, verður at senda til Tjaldurs Apotek, Postboks 3010, 110 Tórshavn, áðrenn 21. mai 2001.

## MANNING

Hervið verður søkt eftir **manning** til M/F Norrönu, til summarsiglingina 2001, sum byrjar 19. mai




Størvini, ið sett verða, umfata allar deildir innan catering so sum:

Pursarar, kokkar, bakarar, sleiparar, barrfólk, cafeteriafólk, tænarar, kioskgentur, koytugentur og informatiónsgentur.

**Fylgjandi krevst:**

- **Heilsuprógv** fyri sjófólk, ikki eldri enn 2 ár.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Elektrikari

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir elektrikara til gøtuljósdeildina.

**Starvið**
Viðkomandi kemur í høvuðsheitum at koyra kurvabilin og fáast við viðlíkahald og nýgerð av gøtu- og ferðsluljósum í kommununi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaraútbúgving sum elektrikari, hava stóra koyrikortið, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jákup Joensen, leiðara, ella Viggo Christiansen, deildarleiðara, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 6. mai 2001. Viðmerk á umsóknina "Elektrikari".

SNARSKIVAN

## Frá Runavíkar Havn

Í sambandi við arbeiðið til víðkan av havnalagnum norðanfyri Høgaból verður heitt á teir, sum eiga kontainarar og aðra útgerð standandi á økinum, um at flyta tað burtur sum skjótast ella í seinasta lagi innan 2. mai 2001.

Lutir, sum ikki eru heintaðir innan omanfyri nevnda dag, verða uttan aðra fráboðan burturbeindir fyri eigarans ábyrgd.




**Runavíkar Havn**

## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 –28 39 53